# Hjárit til KT-vinnupolitikk

## Støðumynd av føroyska fjarskiftismarknaðinum og samanberingar við onnur lond

### Inngangur

Hesi hagtøl eru gjørd í sambandi við, at landsstýrismaðurin í Vinnumálum leggur upprit til KT-vinnupolitikk til aðalorðaskiftis í løgtinginum.

Tá ið hagtalsgreiningar verða gjørdar, kann tað verða torført at eindargera øll viðurskifti, soleiðis at tey gerast fullkomiliga sambærilig, soleiðis er eisini í hesum føri. Tí skulu samanberingarnar verða tiknar við ávísum fyrivarni. T.d. er ymist, nær skift verður frá dagtíð til úrtíð. Eisini er ymist um tað er eitt minsta gjald fyri eina samrøðu ella ikki. Harafturímóti verður hildið at kanningin gevur eina yvirlitsmynd av støðuni.

Samanumtikið, so vísir kanningin, at Føroyar eru nøkulunda væl fyri bornar saman við londini í kanningini, tá ið tað kemur til uttanlands samrøður. Føroyar liggja í hægri lagi tá ið talan er um innanlanda samrøður. Her skal tó havast í huga, at kappingin á økinum er nýggj í Føroyum borin saman við hini londini.Tá ið tað snýr seg um farfjarskifti (mobil) og internetveitingar, hava Føroyar nakað at vinna innaftur. Her er tó eisini væntandi, at kappingin fer at elva til broytingar.
Áhugavert er at síggja, at lutfalsliga smáu londini Ísland og Luksemborg standa seg væl. Tá tað víðvíkur bíligum internetsambandi, so sæst, at Ísland og Ísrael standa seg sera væl. Hesi londini verða mett millum fremstu KT-tjóðir í heiminum.

Er talan um upplýsingar frá fleiri enn einum felag í einum landi, so vísir myndin minstaprísin í landinum. Sostatt kunnu tað vera ymisk hald, sum eru bíligast í ymsu talvunum (eitt nú í talvunum á síðu 4 og 5).

**Tilvísingar til lond og feløg í skjalinum við viðmerking um landanavnið stytt.**

**Føroyar (FO)**

Føroya Tele - www.tele.fo
Kall - www.kall.fo
Teletech - www.teletech.fo
Kappin - www.kappin.fo

**Ísland (IS)**

Landsiminn - www.simi.is
Islandssimi - www.islandssimi.is
Tal - www.tal.is

**Noreg (NO)**

Telenor - www.telenor.no
Netcom - www.netcom.no

**Danmørk (DK)**

TDC - www.teledanmark.dk
Tele2 - www.tele2.dk

**Luksemborg (LU)**

EPT - www.ept.lu
Tele2 - www.tele2.lu

**Ísrael (IL)**
Bezeq - www.bezeq.co.il

**Aðrar styttingar**

Japan (JP)

Amerika (US)

# 1. partur

### Støðumynd av føroyska fjarskiftismarknaðinum

Talvan vísir felagum í Føroyum í tali við ymisum tænastum. Eisini sæst, hvussu stóran part av øllum marknaðinum ymsu veitararnir hava.

| | **Føroya Tele** | | **Kall og TeleF** | | **Teletech** | | **Kappin** | | **Tykissamfelag Svínoy/Fugloy** | | **Til-samans** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fastnet** | | | | | | | | | | | |
| Felagar | 23.324 | 91,6% | 2.130* | 8,4% | | | | | | | 25.454 |
| **Fartelefoni** | | | | | | | | | | | |
| GSM vanligt hald | 12.362 | 100,0% | | | | | | | | | 12.362 |
| GSM vinnuhald | 735 | 100,0% | | | | | | | | | 735 |
| GSM frítíðarhald | 59 | 100,0% | | | | | | | | | 59 |
| Talitíð | 8.202 | 100,0% | | | | | | | | | 8.202 |
| NMT 450 | 1.922 | 100,0% | | | | | | | | | 1.922 |
| NMT 900 | 441 | 100,0% | | | | | | | | | 441 |
| **Internet** | | | | | | | | | | | |
| Uppringt | 7.478 | 91,3% | 716 | 8,7% | | | | | | | 8.194 |
| Fast | 110 | 43,8% | | | 88 | 35,1% | 13 | 5,2% | 40 | 15,9% | 251 |

*: Føroya Tele veitir linjuna.

Tølini hjá Føroya Tele eru gjørd upp 1. oktober 2001 tó fyri fastnetið 24. oktober 2001. Tølini hjá hinum veitarunum eru gjørd upp 24. oktober 2001.

## 2. partur

Hesin parturin lýsir kostnaðin á fjarskiftisveitingum í Føroyum og nøkrum øðrum londum.

Er einki annað nevnt, galda hesar fortreytir:

- Tølini eru gjørd upp seinast í oktober 2001.
- Vanligt hald
- Landstakstir
- Dagtakstir

Í flestum førum er ein 3 minuttir samrøða við uppringingargjaldið samanborin millum ymsar veitarar í Føroyum og øðrum londum. Henda samanberingin leggur ikki upp fyri mánaðargjaldi, tí verður eisini samanborið við, hvussu 100 samrøður, sum vara í 3 minuttir hvør, kosta um dagin, her verða minuttgjald, uppringingargjald og mánaðargjald rokna uppí. Einasta samanbering, sum leggur upp fyri stovningargjald, er fyri fast internetsamband (ADSL).

**Prísgongdin í Føroyum síðani 1999.**

Myndin niðanfyri vísir gongdina fyri eina 3 min. fastnet innanlands samrøðu.




Myndin vísir, at kostnaðurin fyri eina 3 minuttir samrøðu er lækkaður 49% um dagin og 20% um kvøldið seinastu 2 árini.

**Innanlands fastnetsamrøður í ymsum londum**

Myndin vísir hvat ein innanlands 3 minuttir samrøða kostar í ymsum londum minuttgjald og uppringingargjald roknað uppí.




Viðm.: Øll londini hava eindartakst fyri alt landið, undantikin Ísrael og Grønland har tað er gjørd ein 50/50 vekting viðv. lands- og regionaltaksti.

Tað sæst á myndini, at ein 3 minuttir samrøða er bíligast í Íslandi og Luksemborg. Í Grønlandi er slík samrøða dýrast. Tað er 117% dýrari at ringja eina 3 minuttir samrøðu í Føroyum enn í Íslandi.

Myndin niðanfyri vísir, hvat ein vanligur mánaður kostar í ymsum londum. 100 uppringargjøld, 300 minuttir og eitt mánaðargjald roknað uppí.




Viðm.: Øll londini hava eindartakst fyri alt landið, undantikin Ísrael og Grønland, har tað er gjørd ein 50/50 vekting viðv. lands- og regionaltaksti.

Her sæst, at verður mánaðargjaldið roknað uppí, broytist prísurin í Føroyum til at verða bíligari enn í Noregi og ájavnt Ísrael. Íroknað mánaðargjald er Føroyar 66% dýrari enn Ísland.

**Millumlandafastnetsamrøður millum ymis lond**

Talvan vísir, hvat ein uttanlands 3 minuttir samrøða kostar úr Danmark, Føroyum, Grønlandi, Íslandi og Luksemborg til ymis lond íroknað minuttgjald og uppringingargjald.




Sum myndin vísir, so er stórir munur á, hvat tað kostar at ringja til eitt ávíst land úr t.d. Danmark og Luksemborg. Hetta kemst av, at prísirnir verða ásettir eftir marknaðarstøðuni í ymsu londunum, og hava lítið við kostnað ella fjarstøðu at gera. Sum dømi kann nevnast, at tað er munandi bíligari at ringja úr Føroyum til Japans og Ísraels enn úr Danmark. Sum heild eru Ísland og Luksemborg bíligasti londini at ringja úr.

**GSM fartelefoni í ymsum londum**

Myndin niðanfyri vísir, hvat ein 3 min GSM samrøða kostar. Prísurin er fyri samrøðu til fastnet ella fartelefon innanlands.




Tað sæst, at ein 3 min samrøða í Føroyum um dagin er 93% dýrari enn í Danmark og 27% dýrari enn í Íslandi. Fyri eina samrøðu um kvøldið eru tølini 30% og 74%.

Myndini niðanfyri vísir, hvat 100 samrøður, sum hvør varir 3 min, kosta í Føroyum, Íslandi og Danmark. Eitt mánaðargjald er roknað uppí.




Tað sæst, at ein mánaður í Føroyum er 86% dýrari enn í Danmark og 38% dýrari enn í Íslandi. Fyri 100 samrøður um kvøldið eru tølini 34% og 90%.

## Uppringt internetsamband í Føroyum

Myndirnar niðanfyri vísa kostnaðin fyri upprinngt internetsamband hjá Føroya Tele og hjá Kalli.




Myndin omanfyri vísir, at Føroya Tele er 6-7% dýrari enn Kall. Verður mánaðargjaldið tikið við (sí myndina niðanfyri), verður munurin enn størri, tá er hann millum 20 og 30%.



**Uppringt internetsamband í ymsum londum**

Myndin niðanfyri vísir, hvussu nógv tað kostar at vera 18 min. á internetinum.




Tað sæst, at tað um dagin er umleið hálva triðju ferð so dýrt at nýta internetið í Føroyum sum í Ísrael. Prísurin er millum 30 og 64% dýrari enn í hinum londunum á myndini (uttan í Grønlandi, har prísurin í Føroyum er umleið helvtin). Verður mánaðargjaldið verður tikið við, er myndin tann sama.



**ADSL (Fast tráðborið internet samband) í ymsum londum**

Myndin vísir, hvat ADSL kostar um mánaðin 100 MB roknað uppí, og eisini hvat kostnaðurin hevði verið, um stovningarkostnaðirnir vóru avskrivaðir í eitt ár. Linjuferðin á ADSL er fyri samanbornu londini 256/128 kbps. (up/down), undantikin fyri Føroyar, har linjuferðin er 256/64 kbps., og Noreg, har ferðin er 384/128 kbps. (up/down).




Myndin vísir, at ADSL í Føroyum um mánaðin er 77% dýrari enn í Íslandi.